# Ársfrágreiðing

# 2017

# um

# seyðahaldið í Heygshaga

**Hans Martin Andreassen**

*Veturgamal veðrur*
*1. virðisløn*
*Esmar Sørensen*
*Úti í Lið*

# Frágreiðing 2017 um seyðahaldið í Heygshaga:

Árið 2017 byrjaði við nógvum kava fyrst í januar mánaði. Tað var heilt nógvur kavi, so vit góvu súrhoyggj allar kavadagarnar.

Veðrið í lembingini, og hvussu ærnar eru fyri, koma altíð at ávirka lambatalið. Sjálvt um givið verður um várið, kemur gróðurin altíð at ávirka vektina um heystið.

Veðragjólingarnir vóru tiknir inn umleið hálvan januar. Í ár mistu vit ein veðragjóling. Hesin var yvirkoyrdur frammi við Statoilstøðina.

Vit hava flushað seyðin í ár og tóku gjólingarnar inn tann 7. februar, tí er trupult at sammeta vektir og tal av lombum við undanfarin ár. Ætlanin í 2018 er at taka gjólingar og tvæveturærnar inn fyrst í november, so hetta verður ein øðrvísi máti at reka seyðahaldið í Heygshaga.

**Geving - hoyggj:**

Vit góvu hoyggj meginpartin av januarmánaði. Gjólingarnir vórðu tiknir inn, tá ið vit høvdu skannað. Teir vóru royttir og fóru ikki út aftur fyrr enn 17. mai.

**Geving – kraftfóður úti:**

Allur seyðurin fekk (MøllerupMølleA/S) frá 7. nov til 12. des, 600 g um dagin. Byrjaðu aftur at geva 14. mars. Einlemburnar fingu 600 g um dagin til 17. mai. Tvílemburnar, ið gingu niðanfyri landsvegin, fingu skotskt fóður. (Harbro nuts 18) 870 g um dagin.

**Geving Kraftfóður inni:**

Gjólingarnir, ið vóru inni frá 7. febr. til 17. mai, fingu súrhoyggj og kraftfóður.
Helvtin av gjólingunum fingu fóður frá Havsbrún, 200 g um dagin pr. seyð.
Hin helvtin fekk (Danish Agro) 600 g um dagin pr. seyð. Tvílemburnar frá Hvilvt og Svartá vóru inniføddar frá 29. mars til 17. mai. Tær fingu súrhoyggj og kraftfóður (Danish Agro), 800 g um dagin pr. seyð.

**Fjalldagar:**

**Fyrsti fjalldagur:** Róku allan seyðin inn á Støðina tann 6. februar.

**Manning:** Ólavur av Steinum, Jens Ivan í Gerðinum, Jóannes Mikkelsen, Maria M. Olsen, Hendrik Akurstein og Hans Martin Andreassen

**Annar fjalldagur:** Týsdagin tann 7. Februar skannaðu og vigaðu vit áseyðin í Heygshaga – tilsamans 168 ær.

**Manning:** Ólavur av Steinum, Jens Ivan í Gerðinum, Dorthea Joensen, Jóannes Mikkelsen og Hans Martin Andreassen. Eyðstein Jensen og Gunnar Bjørnson skannaðu.



**Triði fjalldagur:** Tann 29. mars róku vit allan seyðin inn á støðina. Vit viðgjørdu allan seyðin við Noromectin fyri ótoy og orm. Vit brúktu Crovect eftir rygginum fýri lús og viðgjørdu við Covexin fyri lambablóðsótt.

**Manning**: Ólavur av Steinum, Andrass Holm Arge, Jóannes Mikkelsen, Hendrik Akurstein, Maria M. Olsen, Jóna Jacobsen, Dorthea Joensen og Hans Martin Andreassen.

**Lembing:**

Lembingin byrjaði av álvara tann 21. apríl, og tað passaði væl eftir tíðini til okkara veðragjólingar. Í ár høvdu vit rímiliga gott veður í lembingini.

**Fjórði fjalldagur:** 17.mai

**Manning:** Ólavur av Steinum, Andrass Holm Arge, Rólvur Djurhuus, Jóannes Mikkelsen og Dorthea Joensen.

Tann 17. mai róku vit ærnar inn til vigingar.

**Fimti fjalldagur:** 4. juli

**Manning**: Ólavur av Steinum, Heri Müller, Ari Johannesson, Bartal Andreassen, Hallur Johannesson, Dánjal Petur Müller, Øssur Andreassen, Dorthea Joensen, Tróndur Leivsson, Rólvur Djurhuus, Jóannes Mikkelsen, Edvard Müller, Jón Müller, Fríðálvur Müller, Brandur Isaksen og Hans Martin Andreassen. Jóannes Debess á Oyrareingjum var í samgongu.

Týsdagin tann 4. juli vóru vit í áseyðaroyting á Búnaðarstovuni. Umframt tað vanliga arbeiðið, varð seyðurin vigaður og vektirnar skrásettar. Hetta hava vit gjørt fleiri ferðir seinastu árini. Tann samlaða miðalvektin í ár er heldur hægri enn í fjør. Tær samlaðu stabbamyndirnar yvir vektirnar gjøgnum árið verða vístar í skurðfjallinum. Av tí at vit ikki royta lomb meira, so eru færri fjalldagar nú enn áður.

Sammeta vit seks tey seinastu árini, er munurin hesin:

| **Ár** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dato** | 3. juli | 3. juli | 9. juli | 8. juli | 5. juli | 4. juli |
| **Miðalvekt í kg.** | 20,81 | 19,9 | 24,6 | 22,56 | 21,5 | 21,4 |

Rokna vit við, at dagligur vøkstur er 250 g, so kunnu vit við hesum rætta okkum inn til 9. juli hvørt ár. So er munurin millum 2014, 2015, 2016 og 2017 hesin:

| **Ár** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|
| **Dato** | 9. juli | 9. juli | 9. juli | 9. juli |
| **Miðalvekt í kg.** | 24,6 | 22,81 | 22,25 | 22,65 |

Tað merkir, at lombini vigaðu 0,40 kg meira í ár enn somu tíð í fjør.

Aftrat teimum vanligu skrásetingunum vóru blóðroyndir tiknar av lombunum, fyri á hendan hátt at kunna ala okkum burtur úr ridluskriðanum.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| AA/RH/QQ | 17001 |
| AV/RR/QQ | 17002 |
| AA/RR/QQ | 17004 |
| AA/RR/QQ | 17006 |
| AA/RR/QQ | 17007 |
| AA/RR/QQ | 17008 |
| AA/RR/QQ | 17011 |
| AA/RR/QQ | 17012 |
| AA/RR/QQ | 17013 |
| AA/RR/QQ | 17014 |
| AA/RH/QQ | 17015 |
| AV/RR/QQ | 17016 |
| AA/RR/QQ | 17017 |
| AA/RR/QQ | 17018 |
| AA/RH/QQ | 17019 |
| AV/RR/QQ | 17020 |
| AA/RR/QQ | 17021 |
| AV/RR/QQ | 17022 |
| AA/RH/QQ | 17023 |
| AA/RR/QQ | 17025 |
| AA/RR/QQ | 17026 |
| AA/RR/QQ | 17027 |
| AA/RR/QQ | 17028 |
| AA/RR/QQ | 17030 |
| AA/RR/QQ | 17031 |
| AA/RR/QQ | 17032 |
| AA/RR/QQ | 17033 |
| AA/RR/QQ | 17035 |
| AA/RR/QQ | 17036 |
| AA/RH/QQ | 17037 |
| AA/RR/QQ | 17038 |
| AA/RR/QQ | 17039 |
| AA/RR/QQ | 17040 |
| AA/RR/QQ | 17042 |
| AA/RR/QQ | 17044 |
| AV/RR/QQ | 17047 |
| AA/RR/QQ | 17050 |
| AA/RR/QQ | 17052 |
| AA/RR/QQ | 17053 |
| AA/RR/QQ | 17054 |
| AA/RR/QQ | 17056 |
| AV/RR/QQ | 17101 |
| AA/RR/QQ | 17102 |
| AV/RR/QQ | 17103 |
| AA/RR/QQ | 17104 |
| AV/RR/QQ | 17105 |
| AA/RR/QQ | 17106 |
| AA/RR/QQ | 17107 |
| AA/RR/QQ | 17108 |
| AA/RH/QQ | 17208 |
| AA/RR/QQ | 17209 |
| AA/RR/QQ | 17210 |
| AV/RR/QQ | 17211 |
| AA/RR/QQ | 17212 |
| AV/RR/QQ | 17214 |
| AA/RR/QR | 17215 |
| AA/RR/QQ | 17217 |
| AA/RR/QQ | 17218 |
| AA/RR/QQ | 17219 |
| AV/RR/QQ | 17220 |
| AV/RR/QQ | 17221 |
| AV/RR/QQ | 17222 |
| AV/RR/QQ | 17223 |
| AV/RR/QQ | 17224 |
| AV/RR/QQ | 17225 |
| AA/RR/QQ | 17226 |
| AA/RR/QQ | 17226 |
| AA/RR/QQ | 17227 |
| AV/RR/QQ | 17231 |
| AA/RR/QR | 17232 |
| AA/RR/QQ | 17233 |
| AA/RR/QQ | 17234 |
| AA/RR/QQ | 17235 |
| AA/RR/QR | 17236 |
| AA/RR/QQ | 17236 |
| AV/RR/QQ | 17237 |
| AV/RR/QQ | 17238 |
| AA/RR/QQ | 17239 |
| AV/RR/QQ | 17240 |
| AA/RR/QQ | 17241 |
| AA/RR/QQ | 17242 |
| AV/RR/QQ | 17243 |
| AV/RR/QQ | 17244 |
| AA/RR/QQ | 17245 |
| AA/RR/QQ | 17246 |
| AV/RR/QQ | 17247 |
| VV/RR/QQ | 17248 |
| AA/RR/QQ | 17249 |
| AA/RR/QQ | 17251 |
| AV/RR/QR | 17252 |

| | |
|---|---|
| AV/RR/QQ | 17253 |
| AA/RR/QQ | 17254 |
| AV/RR/QQ | 17255 |
| AV/RR/QR | 17256 |
| AA/RR/QQ | 17257 |
| AV/RR/QR | 17258 |
| AV/RR/QQ | 17259 |
| AA/RR/QQ | 17260 |
| AA/RR/QQ | 17109 |
| AA/RR/QQ | 17110 |
| AA/RR/QQ | 17111 |
| AA/RR/QQ | 17112 |
| AA/RH/QQ | 17113 |
| AA/RR/QQ | 17114 |
| AA/RR/QQ | 17115 |
| AA/RR/QQ | 17116 |
| AA/RH/QQ | 17117 |
| AA/RR/QQ | 17118 |
| AA/RH/QQ | 17119 |
| AA/RR/QQ | 17120 |
| AA/RR/QQ | 17121 |
| AA/RR/QQ | 17122 |
| AV/RR/QQ | 17123 |
| AV/RR/QQ | 17124 |
| AA/RR/QQ | 17125 |
| AA/RR/QQ | 17126 |
| AV/RR/QQ | 17127 |
| AV/RR/QQ | 17128 |
| AA/RR/QQ | 17129 |
| AA/RR/QQ | 17130 |
| AA/RR/QQ | 17131 |
| AA/RR/QQ | 17132 |
| AA/RH/QQ | 17133 |
| AV/RR/QQ | 17134 |
| AV/RR/QQ | 17135 |
| AA/RR/QQ | 17136 |
| AA/RR/QQ | 17137 |
| AA/RR/QQ | 17138 |
| AA/RR/QQ | 17139 |
| AA/RR/QQ | 17140 |
| AV/RR/QQ | 17141 |
| AV/RR/QQ | 17143 |
| AV/RR/QQ | 17144 |
| AA/RR/QQ | 17145 |
| AA/RR/QQ | 17146 |
| AA/RR/QQ | 17147 |
| AA/RR/QQ | 17149 |
| AA/RH/QQ | 17150 |
| AA/RH/QQ | 17151 |
| AA/RR/QQ | 17152 |
| AA/RR/QQ | 17201 |
| AA/RR/QQ | 17202 |
| AA/RH/QQ | 17203 |
| AA/RR/QQ | 17204 |
| AV/RR/QQ | 17205 |
| AV/RR/QQ | 17206 |
| AA/RR/QQ | 17207 |
| AV/RR/QQ | 17261 |
| AA/RR/QR | 17301 |
| AA/RR/QR | 17302 |
| VV/RR/QQ | 17303 |
| AA/RR/QQ | 17306 |
| AV/RR/QQ | 17307 |
| AA/RR/QQ | 17311 |
| AA/RR/QQ | 17313 |
| AA/RR/QQ | 17314 |
| AA/RR/QQ | 17316 |
| AA/RR/QQ | 17317 |
| AV/RR/QR | 17318 |
| AA/RR/QQ | 17319 |
| AA/RR/QQ | 17320 |
| AA/RR/QQ | 17321 |
| AA/RR/QQ | 17323 |
| AA/RR/QQ | 17324 |
| AA/RR/QR | 17325 |
| AA/RR/QQ | 17327 |
| AA/RH/QQ | 17327 |

Kanningar hava víst, at onkrar ílegur eru meir mótstøðuførar móti ridluskriða enn aðrar. Niðanfyri er talva, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt, sum vegleiðing um, hvørjar ílegur eru mest mótstøðuførar móti ridluskriða. Seyður er eisini í Føroyum, sum hevur VV í Codon 136. Hesin seyður er sera lítið mótstøðuførur móti ridluskriða.

| Codon 136 | Codon 154 | Codon 171 | Mótstøðuføri |
|---|---|---|---|
| AA | RR | RR | Seyður við hægst mótstøðuføri fyri ridluskriða.<br>Sera væl egnaður til aling (at seta við). |
| AA | RH | RR | |
| AA | HH | RR | |
| AA | RR | QR | Seyður við høgum mótstøðuføri fyri ridluskriða.<br>Væl egnaður til aling. |
| AA | RH | QR | |
| AA | HH | QR | |
| AA | RR | QQ | Seyður, ið hevur mótstøðuføri fyri ridluskriða.<br>Kann nýtast til aling. |
| AA | RH | QQ | |
| AA | HH | QQ | |
| AV | RR | RR | Seyður, ið er minni mótstøðuførur fyri ridluskriða.<br>Skal helst ikki nýtast til aling. |
| AV | RH | RR | |
| AV | HH | RR | |
| AV | RR | QR | |
| AV | RH | QR | |
| AV | HH | QR | |
| AV | RR | QQ | |
| AV | RH | QQ | |
| AV | HH | QQ | |

Síðani 2014 hevur Búnaðarstovan bert brúkt brundir við AA í Codon 136. Myndin niðanfyri vísir, hvussu ílegurnar eru broyttar í %, eftir at vit í 2014 bert fóru at sleppa brundum upp, sum hava AA í Codon 136. Í 2014 var parturin av AA 34,8%, hetta tal er so líðandi vaksið upp í 72,8% í 2017. Í 2014 vóru 52,2% av lombunum AV, tað er meira enn helmingurin. Hetta tal er minkað niður í 26% í 2017.




Sum væntað fór parturin av VV niður í null longu fyrsta árið, men heldur óvæntað kom okkurt VV lamb fyri bæði í 2016 og 2017. Frágreiðingin er helst tann, at við tað at Heygshagi ikki er hegnaður av, koma fremmandir brundir í hagan av og á. Hetta er helst frágreiðingin upp á, at tað kemur fyri, at okkurt lamb hevur VV í Codon 136.

**Sætti fjalldagur:** 30. august

**Manning:** Ólavur av Steinum, Jens Ivan í Gerðinum, Rasmus Magnusson, Tróndur Leivsson, Dorthea Joensen, Ari Johanneson, Øssur Andreassen, Heri Müller, Hendrik Akurstein og Hans Martin Andreassen.

**Slaktið**

Síðst í september varð skipað fyri tiltaki í Vágsbotni í Tórshavn, har dentur var lagdur á at vísa á, hvat landbúnaðurin í Føroyum hevur at geva. Búnaðarstovan lat 3 gimburlomb til tiltakið. Hesi krovini vórðu grillað á tiltakinum. Eisini lat Búnaðarstovan ein11 mánaðar gamlan tarvkálv til Slaktið.

**Sjeyndi fjalldagur:** 21. September

**Manning:** Ólavur av Steinum, Rasmus Magnusson, Jens Ivan í Gerðinum, Hendrik Akurstein, Dánjal Petur Müller, Heri Müller, Øssur Andreassen, Jóna Jacobsen, Jóannes Arge, Sakir Tróndarson Frýdal, Ari Johanneson og Hans Martin Andreassen.

Jóannes Debess og Erik Heinesen vóru í samgongu.

Tann 21. september vóru vit í skurðfjall. Vit róku allan hagan og viðgjørdu allan seyðin. Allur seyðurin varð vigaður. Avdeyðaærnar vórðu tiknar, og verðagjólingar og sleppingarlomb slept upp. Lombini, ið skuldu flettast, vóru tikin. Áseyðurin varð viðgjørdur við Combinex fyri orm. Sleppingarlombini vóru sproytað fyri garnasótt og við Covexin fyri lambablóðsótt.

**Vekt á óm og lombum**

Vit vóru á fjalli týsdagin tann 21. september 2017. Vit vigaðu allan seyðin, sum vit gera á hvørjum fjalli. Í 2017 gav hagin 189 lomb, móti 188 lombum í fjør. Á heysti 2016 vigaðu lombini 7265 kg livandi, í 2017 vigaðu tey tilsamans 7655 kg livandi. Miðalvektin á livandi lombum var 40,5 kg í 2017 móti 40,8 kg árið fyri. Krovini vigaðu í miðal 32,5 pund í 2017 móti 31,5 í 2016. Flett vekt av lombunum var í miðal 40,1 prosent av livandi vekt í 2017 í mun til 38,6 prosent árið fyri av livandi vekt.

**Sýning av veðurlombum:** Í sambandi við at blóðroyndir eru tiknar av lombunum fyri at staðfesta, hvørjar ílegur tey hava, var ein sýning gjørd av øllum veðurlombunum, sum vóru ílegukannað. Hetta var gjørt fyri at vita, um nakar sjónligur munur sæst á teimum, sum hava ílegurnar AA ella AV. Hetta fara vit at gera nøkur ár afturat. Úrslitið í ár vísir ikki nakran stórvegis mun millum AA og AV. Sí talvu niðanfyri.

| Ílegur | Bein aftan | Bein framman | Horn | Ull | Heildarmynd | Stig í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **AA** | 5,72 | 5,78 | 6,39 | 6,39 | 6,00 | 30,28 |
| **AV** | 5,80 | 5,33 | 5,67 | 6,27 | 6,07 | 29,13 |
| **Miðal** | 5,76 | 5,58 | 6,06 | 6,33 | 6,03 | 29,76 |

## Vektir 2017

**Sunnasta Gonga ærsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| 7. februar | 43,9 kg |
| 29. mars | 48,4 kg |
| 17. mai | 48,7 kg |
| 4. juli | 52,3 kg |
| 30. august | 57,6 kg |
| 21. september | 56,5 kg |
| Flett vekt á ónum | 44,3 pund |

**Miðjan ærsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| 7. februar | 45 kg |
| 29. mars | 49,0 kg |
| 17. mai | 49,7 kg |
| 4. juli | 52,2 kg |
| 30. august | 57,5 kg |
| 21. september | 56,7 kg |
| Flett vekt á ónum | 41,2 pund |

**Svartá ærsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| 7. februar | 44,0 kg |
| 29. mars | 47,2 kg |
| 17.mai | 49,4 kg |
| 4. juli | 50,2 kg |
| 30. august | 55,6 kg |
| 21. september | 56,1 kg |
| Flett vekt á ónum | 41,3 pund |

**Hvilvt ærsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| 7. februar | 46,3 kg |
| 29. mars | 48,1 kg |
| 17.mai | 49,0 kg |
| 4. juli | 50,5 kg |
| 30. august | 56,4 kg |
| 21. september | 57,3 kg |
| Flett vekt á ónum | 48,0 pund |

**Sunnasta Gonga lambsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| Í lembing | 3,745 kg |
| 17. mai | 8,21 kg |
| 4. juli | 20,30 kg |
| 30. august | 35,10 kg |
| 21. september | 39,30 kg |
| Flett vekt | 30,70 pund |

Flett vekt í % av livandi vekt 39,10%

**Miðjan lambsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| Í lembing | 4,217 kg |
| 17. mai | 8,60 kg |
| 4. juli | 21,8 kg |
| 30. august | 37,1 kg |
| 21. september | 41,0 kg |

| | |
|---|---|
| Flett vekt | 32,6 pund |

Flett vekt í % av livandi vekt 39,74%

**Svartá lambsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| Í lembing | 3,875 kg |
| 17. mai | 9,1 kg |
| 4. juli | 22,6 kg |
| 30. august | 34,5 kg |
| 21. september | 42,1 kg |
| Flett vekt | 34,1 pund |

Flett vekt í % av livandi vekt 40,53%

**Hvilvt lambsvektir:**

| **Vigingardagur** | **Miðalvekt** |
|---|---|
| Í lembing | 3,344 kg |
| 17.mai | 7,3 kg |
| 4. juli | 19,5 kg |
| 30. august | 34,5 kg |
| 21. september | 38 kg |
| Flett vekt | 31,2 pund |

Flett vekt í % av livandi vekt 41,11%

**Fletting:**

Vit flettu allan seyðin á støðini. Manningin var Øssur Andreassen, Jóhannes Arge, Mogens Wraae, Bergur Lützen, Terji Jacobsen, Brandur Isaksen og Bartal Andreassen

Frá Búnaðarstovuni vóru Hans Martin Andreassen og Rasmus Magnusson.

**Bruttoúrtøka 2017:**
Í 2017 gav hagin 189 lomb móti 188 lombum í fjør. Á heysti 2016 vigaðu lombini 7265 kg livandi, í 2017 vigaðu tey tilsamans 7.655 kg livandi. Miðalvektin á livandi lombum var 40,5 kg í 2017 móti 40,8 kg árið fyri. Krovini vigaðu í miðal 32,5 pund í 2017 móti 31,5 í 2016. Flett vekt av lombunum var í miðal 40,1 prosent av livandi í 2017 í mun til 38,6 prosent árið fyri av livandi vekt.

**Veðragjólingar:**

Vit gjørdu 8 lomb upp til veðragjóling, harafturat høvdu vit 2 veðrar. Vit sleptu brundseyðunum út tann 28. november. Í hagan fóru 2 veðrar og 4 veðragjólingar. Fýra veðragjólingar vóru hjá ónum, ið vóru inni.

**Smakkurin á kjøti**

Føroyingar hava etið turt kjøt og skerpikjøt í øldir, og tað tykist, sum at undirtøkan fyri hesum forna mati er vaksandi millum fólk, og nógv verður gjørt burtur úr smakkinum. Robert Joensen, sum hevur skrivað nógvar bøkur um seyð, viðger eisini hetta evnið. Á bls. 240 í nýggjastu bókini hjá Robert Joensen, sum Sprotin hevur givið út stendur:

*Av royndum munnu føroyingar hava lært, hvussu teir skuldu fáa gott og passaliga ræst skerpikjøt. Var kalt í veðrinum, lótu menn krovini hanga inni í roykstovuni eitt ella tvey samdøgur, eftir at flett var. Tí krov, sum tornar í kulda, fær ongan smakk, tað ræstnar ikki.*

Hetta, sum Robert Joensen skrivar, er eitt áhugavert uppáhald, men okkum kunnugt eru ongar nágreiniligar royndir gjørdar fyri at eftirkanna, hvussu álítandi henda gamla vitan er. Búnaðarstovan hevur tí sett sær fyri at kanna hetta nærri, og vit hava gjørt nakrar kanningar seinastu árini.

Til hetta nýttu vit 12 veðurlambskrov av lombum, sum vóru flett sama dag. Krovini vigaðu 28 – 32 pund. Tvey krov blivu beinanvegin hongd í kølirúm við 5 hitastigum. Tvey krov blivu hongd í hjallin beinanvegin, meðan hini blivu hongd innandura í 14 hitastigum. Síðani vóru hvønn fylgjandi dag tvey krov hongd í hjallin. Bøgir og tjógv vóru skorin frá og vóru hangandi í hjallinum. Frá desember til juni vóru 8 smakkiroyndir gjørdar av kjøtinum, 4 tær fyrstu av bógvi og 4 tær seinastu av tjógvi. Dómararnir dømdu smakkin á kjøtinum og góvu stig frá 0 til 10, har 10 er best.

Fyribils úrslitið av kanningunum fyri árini 2012 - 2017 sæst niðanfyri:



***Búnaðarstovan 2018***

***Hans Martin Andreassen***